# SUMBIAR KOMMUNA
## STÝRISGERÐABÓK 2016
## 25/02-2016-02

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 02**<br>Tíð: **25. Februar. 2016, kl. 16:00**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis:<br><br>Niclas Hentze burturstaddur. fráboðað.<br>Borgarstjórin leggur ynski um, at fáa eitt mál við á skrá aftrat. Einmælt samtykt, hettar mál kemur inn sum nr. 02/10 |
| Fastir fundardagar:<br><br>29.01 – 26.02 – 26.03 – 11.04 – 09.05 – 17.06 – 15.08 - 23.09 – 24.10 – 07.11 – 05.12 | Møttir:<br>Eyðbjørn Thomsen<br>Frits Poulsen<br>Rúni Lisberg<br>Brynleif Bech |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 02/01**<br>• **Umsókn um stuðul vegna Víkingadagar í Hovi.** | • Sumbiar kommuna metir seg hava stuðla ígjøgnum Suðuroyar ferðavinnufelag, so meiri stuðul verður ikki latin. |
| **Mál nr. 02/02**<br>• **Svar frá Arbeiðsmannafelagnum viðv. keyp av Samkomuhúsinum.** | • Samtykt var at keypa samkomuhúsið fyri 100.000,- kr. Kommunan vil hava, at Arbeiðsmannafelagið fær viðurskiftini viðv. dansiloyvinum uppá pláss innan yvirtøkuna, sum kann verða 01.11.2016 |
| **Mál nr. 02/03**<br>• **Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 164a.** | • Samtykt at geva byggiloyvi á matr.nr. 164a eftir innsendu skitsu, men viðmælir kommunan, at nýggi bygningurin hevur sama snið sum teir gomlu. |
| **Mál nr. 02/04**<br>• **Umsókn um keyp av einum bygningi á matr. nr. 67a.** | • Sambart § 44 í Kommunustýrislógini: "Føst ogn hjá kommununi má ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongdina við almennum útboði umframt reglur um, at ávísar ognir kunnu undantakast almennum útboði."<br>Samtykt varð at lýsa hesa ogn til sølu. |
| **Mál nr. 02/05**<br>• **Viðvíkjandi klagu um starvsetanir í Musikkskúlanum í Suðuroy.** | • Sumbiar kommuna bíðar eftir fundi sum verður í Musikkskúlanum í Suðuroy. Sumbiar kommuna hevur valt eitt umboð í musikkskúlan fyri Suðuroy, at taka avgerðir fyri Sumbiar kommunu. |
| **Mál nr. 02/06**<br>• **Ymisk arbeiðir hjá kommununi sum skula gerast.** | • Sí word skjal. |
| **Mál nr. 02/07**<br>• **Arbeiðsformaður til Sumbiar kommunu.** | • Samtykt varð at søkja eftir einum arbeiðsformanni.<br>Núverandi arbeiðsformaður fer frá vegna aldur í juni 2016. |
| **Mál nr. 02/08**<br>• **Leiðarin upp í fulla tíð hjá Suðuroyar Barnaverndar tænastu.** | • Sumbiar kommuna tekur undir við, at leiðarin fer upp í fulla tíð, treytað av, at fíggingin verður funnin innan verandi fíggjarætlan. |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 02/09**<br>• **Parkerings forboð í Sumba.** | • Útsett til komandi fund. |
| **Mál nr. 02/10**<br>• **Umsókn um stuðul til útferð við teim gomlu á Hamragarði.** | • Kommunan er sinna at stuðla, men vil hava greiði á, hvussu nógv fólk fara, hvat kostar ferðin og hvør skipar fyri ferðini? |
| **Til kunningar/støðutakan.**<br>• **Sosiala samstarvið.**<br>• **Yvirflati vatn.**<br>• **Spillivatns ætlanin. (Víkarbyrgi)** | • Kunnað varð um hetta, eitt møguligt samstarv verður tikið upp aftur á einum av komandi fundi.<br>• Samtykt var at gera ein garð í eystara borð.<br>• Kunnað varð um hettar. |
| **Til støðutakan ella lukkaðan fund.** | |

Fundurin lokin kl. 19:00

Eyðbjørn Thomsen

Frits Poulsen

Rúni Lisberg

Brynleif Bech